| EINSTAKLINGAVIRKI | ÍOGNARFELAG | SMÁPARTAFELAG | PARTAFELAG |
|---|---|---|---|

## Einstaklingavirki

**Einstaklingavirki:** Einstaklinga- virki er tengt at eigaranum. Er tann einfaldasti hátturin at reka vinnuligt virksemi. Møguligt er, at hava ein ella fleiri í starvi. Ofta verður sæð, at útróðrarmenn, handverkarar og sølufólk reka virki sum einsstaklingavirki.

**Byrjan av virksemi:** Einstaklingavirkið skal skrásetast hjá TAKS.

**Byrjunarkapitalur:** Eingin krøv eru um minstaskapital.

**Ábyrgd:** Í einum einstaklingavirki hevur eigarin persónliga ábyrgd av øllum skyldum hjá virkjunum t.d. skuld, løn, húsaleigu v.m. Eigarin kann ábyrgdast við øllum sum hann eigur. T.d. húsi, bili og peningi á bók v.m.

**Bókhald og ársroknskap:** Bókhald skal førast og skattaroknskapur skal gerast.

Tað er ikki eitt krav at ársroknskapur skal almannakunngerast ella grannskoðast.

**Skattur:** Avlop í einstaklingavirki verður skattað hjá eigaranum við einum marginalskattaprosenti millum 40-55%.

**Meirvirðisgjald:** Einstaklingavirki skal sum høvðusregla skrásetast fyri mvg og avrokna mvg 4. ferðir árliga. Selur ein fyri undir 30 tkr. árliga, skal ikki rindast avgjald.

**Aðrar lógir:** Einstaklingavirkir eru vanliga regulera í generellum lógum. Td. bókhaldslógini, skattalógini, meirvirðisgjaldslógini vm.

## Íognarfelag

**Íognarfelag:** Íognarfelag er tengt at eigarunum. Íognarfelag er eitt virkisslag, har tveir ella fleiri persónar eiga eitt virki í felag. Eigararnir kunnu verða persónar ella smá-/partafeløg. Mælt verður til, at tað verður gjørdur ein íognarsáttmáli.

**Byrjan av virksemi:** Íognarfelag skal skrásetast hjá TAKS.

**Byrjunarkapitalur:** Eingin krøv eru um minstakapital.

**Ábyrgd:** Tað líkist einstaklingavirkinum á tann hátt, at allir eigarar ábyrgdast persónliga, tað er, við øllum, sum teir eiga. Harumframt ábyrgdast teir solidariskt, sum merkir, at hvør einstakur hevur ábyrgd av allari skuldini, sum virkið hevur.

**Bókhald og ársroknskap:** Bókhald skal førast og skattaroknskapur skal gerast.

Tað er ikki eitt krav at ársroknskapur skal almannakunngerast ella grannskoðast.

**Skattur:** Avlop í íognarfelag verður skattað hjá eigaranum við tí lutfalli sum teir eiga. Skattaprosenti er marginalskattaprosenti, vanliga millum 40-55%.

**Meirvirðisgjald:** Íognarfelag skal sum høvðusregla skrásetast fyri mvg og avrokna mvg 4. ferðir árliga.

**Aðrar lógir:** Íognarfeløg eru vanliga regulera í generellum lógum. Td. bókhaldslógini, skattalógini, meirvirðisgjaldslógini vm.

## Smápartafelag

**Smápartafelag:** Eitt smápartafelag er eitt sjálvstøðug løgfrøðiligt felag, sum er sundurskild frá eigaranum. Eitt smápartafelag kann verða stovnað av einum ella fleiri við at gera ein skrivligan sáttmála um stovnanina. Eisini skulu smápartafeløg hava sínar egnu viðtøkur, sum siga, hvat endamálið er við virkinum v.m. Møguligt er at hava ein ella fleiri persónar í starvi.

**Byrjan av virksemi:** Smápartafelag skal skrásetast hjá TAKS og Skráseting Føroya.

**Byrjunarkapitalur:** Vinnufelagslógin ásetur, at minstakravi til smápartafeløg er 80.000 kr. í innskotspeningi. Møguligt er at skjóta onnur virðir enn kr. í felagið

**Ábyrgd:** Í einum smápartafelag er ábyrgdin avmarkað. Orsakað av m.a. tí avmarkaðu ábyrgdini eru lógarkrøv til smápartafeløg og ársroknskapir teirra.

**Bókhald og ársroknskap:** Bókhald skal førast og árs- og skattaroknskapur skal gerast og sendast til ávikavist Skráseting Føroya og Taks. Undir ávísum treytum skal hann grannskoðast. Ársroknskapir eru almennir.

**Skattur:** Skattskyldugt avlop í einum smápartafelag verður skattað við einum skattaprosenti á 18%.

**Meirvirðisgjald:** Smápartafeløg skulu sum høvðusregla skrásetast fyri mvg og avrokna mvg 4. ferðir árliga.

**Aðrar lógir:** Vinnufelagslógin, ársroknskaparlógin, skattalógin, bókhaldslógin, meirvirðisgjaldslógin vm.

## Partafelag

**Partafelag:** Eitt partafelag er eitt sjálvstøðug løgfrøðiligt felag, sum er sundurskild frá eigaranum. Eitt partafelag kann verða stovnað av einum ella fleiri við at gera ein skrivligan sáttmála um stovnanina. Eisini skulu partafeløg hava sínar egnu viðtøkur, sum siga, hvat endamálið er við virkinum, hvussu stórur partapeningurin er, hvør er í nevndini, hvør er stjóri, og annað. Møguligt er at hava ein ella fleiri persónar í starvi.

**Byrjan av virksemi:** Partafelag skal skrásetast hjá TAKS og Skráseting Føroya.

**Byrjunarkapitalur:** Vinnufelagslógin ásetur, at minstakræv til partafelag er 500.000 kr. í partapeningi. Møguligt er at skjóta onnur virðir enn kr. í felagið

**Ábyrgd:** Í einum partafelag er ábyrgdin avmarkað. Orsakað av m.a. tí avmarkaðu ábyrgdini eru lógarkrøv til partafeløg og ársroknskapir teirra.

**Bókhald og ársroknskap:** Bókhald skal førast og árs- og skattaroknskapur skal gerast og sendast til ávikavist Skráseting Føroya og Taks. Í flestum førum skal ársroknskapurin grannskoðast. Ársroknskapir eru almennir.

**Skattur:** Skattskyldugt avlop í einum partafelag verður skattað við einum skattaprosenti á 18%.

**Meirvirðisgjald:** Partafeløg skulu sum høvuðsregla skrásetast fyri mvg og avrokna mvg 4. ferðir árliga.

**Aðrar lógir:** Vinnufelagslógin, ársroknskaparlógin, skattalógin.

Áðrenn støðutakan til stovnan av virki, eigur ein altíð at ráðføra seg við eitt nú grannskoðarar, sakførarar ella aðrar ráðgevarar. Omanfyristandandi tekstur lýsir bert nøkur av týðandi yvirskipaðu viðurskiftinum, sum ein eigur at umhugsa.